# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit fara at vinna kríggið í Irak innan 2013, og tá verður Irak eitt vælvirkandi demokrati*

*John McCain*

# Fjórðingurin av heimsins djórum horvin tey seinastu 25 árini



*Dálking og ovurveiða eru høvuðsorsøkin til, at djórasløgini í heiminum eru fækkað í stórum*

*Mynd: Polfoto*

**Síðani 1970 er næstan ein triðingur av heimsins villdjórum horvin**

Vit hava neyvan varnast tað, men tey seinastu 25 árini er djóratalið í heiminum minkað ein heilan fjórðing. Tað er niðurstøðan, sum bretski stovnurin Zoological Society of London og Heimsnáttúrugrunnurin WWF hava gjørt burtur úr einari drúgvari frágreiðing um djóralívið á Jørðini.

Í frágreiðingini verður greitt frá støðuni hjá umleið 1.400 ymsum djórasløgum og gongdini hjá teimum í árunum frá 1970 til 2005. Niðurstøðan er, at tað eru serliga djór, sum liva í og við feskt vatn, sum líða, og at 29 prosent av hesum djórasløgunum eru horvin tey seinastu 25 árini. Frágreiðingin vísir eisini, at tað eru sera ymisk djór, sum líða í hesum árum, og nevnd verða so ólík djór sum afrikanskar antilopur, svørðfiskur og hamarahávur.

## Ávirkar mannaættina

Um orsøkina til gongdina í djóraheiminum sigur frágreiðingin, at menniskjan eigur høvuðsorsøkina. Vit dálka verri, fiska- og djórastovnar verða ov hart troyttir, og alt ov mong fólk vilja sleppa at búgva í býum, sum ger, at minni pláss er til djór og náttúruna sum heild.

Tað er ikki bara djóraheimurin, sum verður ávirkaður av, at so nógv djórasløg doyggja út, tí hendan gongdin ávirkar eisini mannaættina, sigur aðalstjórin í WWF, James Leape, við BBC.

- Eingin sleppur undan avleiðingum, tá margfeldið í heimsins djóralívi minkar. Eitt nú skerjir tað okkara møguleikar at verja okkum ímóti sjúkum, sigur hann.

Men eitt gott tekin er, tí tað vísir seg, at færri djórasløg eru horvin tey seinnu árini, og tað taka granskararnir sum eitt tekin um, at arbeiðið at verja umhvørvið hevur borið ávøkstur.

# Fyrrverandi hermenn ilskast inn á Bush

**Amerikanski forsetin sigur, at hann er givin at spæla golf av virðing fyri teimum hermonnunum, sum eru í kríggi í Irak og Afghanistan**



*George W. Bush, forseti, er givin at spæla golf. Tað er ósømiligt av forsetanum at spæla golf, meðan amerikanskir hermenn eru í kríggi, sigur hann*

*Mynd: Reuters*

- Eg haldi, at sum forseti eigi eg at vísa samhuga við teimum, sum vara av okkara hermonnum uttanlands. Tí eri eg givin at spæla golf, tí eg haldi ikki, at tað er sømiligt fyri forsetan at spæla golf, meðan amerikanskir hermenn gera tænastu uttanlands, sigur George W. Bush, forseti, í samrøðu við Yahoo.

Men amerikanskir hermenn, sum hava verið í kríggi, halda lítið um avgerðina hjá forsetanum og „offur" hansara. Brandon Friedman, sum hevur gjørt tænastu í Irak og Afghanistan, sigur við Sky News, at nógvir túsund amerikanarar hava verið noyddir at leggja munandi meiri enn golfspælið á hyllina orsakað av bardaganum ímóti yvirgangi.

- Avgerðin hjá forsetanum vísir bara, hvussu lítla føling hann hevur við teimum vanligu amerikanarunum og serstakliga teimum, sum gera tænastu í Irak og teirra avvarðandi, sigur Brandon Friedman við Sky News.

**STUTT SAGT**

## Átøk ímóti ólógligum innflytarum

Í Italia eru myndugleikarnir farnir í hernað ímóti útlendingum, sum eru komnir ólógliga til landið. Í gjár varð fráboðað, at umleið 100 útlendingar vóru tiknir, og at 53 teirra vóru sendir av landinum. Teir tiknu vóru úr Eysturevropa, Albania, Grikkalandi, Norðurafrika og Kina. Italska løgreglan hevur leingi víst á, at nógvir av teimum ólógligu innflytarunum fáast við ymiskt ólógligt virksemi. Harafturat hevur landið stórar trupulleikar av rumenskum sigoynarum, sum hava búsett seg í Napoli, og sum halda seg uttan fyri tað vanliga samfelagið.

Undir valstríðnum herfyri lovaði Silvio Berlusconi at loysa trupulleikarnar við teimum nógvu ólógligu innflytarunum, um hann bleiv valdur. Tað bleiv hann, og átøkini hjá løgregluni eru tekin um, at hann heldur orð.



*Silvio Berlusconi heldur vallyfti*

*Mynd: Polfoto*

## Sendiharri hóttur

Myndugleikarnir í Avstralia eru ørkymlaðir av, at landsins sendiharri í Fijioyggjunum hevur fingið tvær drápshóttanir teir seinastu fjúrtan dagarnar, og avstralska stjórnin hevurtíbiðið myndugleikarnar í oyggjunum styrkja vaktarhaldið kring sendiharran og sendistovuna. Viðurskiftini millum Avstralia og Fijioyggjarnar hava verið heldur septn, síðani Frank Bainimarama tók valdið í oyggjunum fyri tveimum árum síðani. Hann hevur lovað at skipa fyri vali næsta ár.